GJALDSTOVAN

Útbjóðingarskjal um videokervið

# Leitað verður eftir veitara at veita videokervið til videoviðtalur á Vanganum

## Inngangur

Útbjóðingartreytirnar lýsa gongdina í útbjóðingini og áseta leiðreglurnar fyri at lata tilboð, fyri møguligt samráðingartíðarskeið, samskifti millum tilboðsgevara og útbjóðara og upplýsingum um gongdina annars.

## Útboðstilfar

| | |
|---|---|
| **Fylgiskjal 1** | Sáttmálin |
| **Fylgiskjal 2a** | Requirements (krøv) |
| **Fylgiskjal 2b** | Veitarans svar |
| **Fylgiskjal 3** | IT Security Requirements (Kt-trygdarkrøv) |
| **Fylgiskjal 4** | Service Level Agreement |
| **Fylgiskjal 5** | Dátuverndaravtala |
| **Fylgiskjal 6** | Tilvísing |

## Tíðarætlan

Útboðið verður væntandi framt sambært niðanfyristandandi tíðarætlan. Útbjóðarin tilskilar sær rætt til at broyta tíðarætlanina.

| **Dagfesting** | **Virksemi** |
|---|---|
| 09.06.26 | Kunngering av útboðstilfarið |
| 14.07.26* | Freist at seta spurningar til útboðstilfarið |
| 16.07.26* | Freist at svara spurningum |
| **10.08.26, kl. 12:00** | **Freist at lata tilboð inn** |
| 10.08.26-17.08.26 | Viðgerð av tilboðum |
| 17.08.26 | Kunngering av vinnara og undirskrift av sáttmála |

Um tørvur er á møguligum samráðingum, verður hetta upplýst eftir 10.08.26, og tíðarætlanin verður justera tilsvarandi.

*Gjaldstovan kann møguliga svara spurningum, sum koma inn eftir spurnarfreistina og fram til 6 dagar áðrenn tilboðsfreistina, men vegna summarferiu verður viðmælt at seta spurningar áðrenn spurnarfreistina.

# Um Gjaldstovuna

Á Gjaldstovuni vilja vit gera Føroyar effektivari.

Hetta stóra mál royna vit at lyfta á fleiri mótum. Vit vilja, at okkara landsbúskapur verður stýrdur fíggjarliga skynsamt grundað á neyv fíggjartøl. Vit vilja, at stovnar landsins skulu brúka bestu og mest framkomnu kt-loysnirnar. Vit vilja, at innkeyp hjá landinum verða bjóðað út, so vit fáa meira fyri peningin. Harumframt vilja vit ganga undan at gera Føroyar til eitt av mest talgildu samfeløgum í heiminum, millum annað við at menna talgildar tænastur á Vanganum.

# Um uppgávuna

Visjón 2 í Heildarætlan 2.0 fyri Talgildu Føroyar fevnir um samanhangandi tænastur fyri borgarar og vinnu. Málið er at veita videoviðtalur millum borgarar og starvsfólk hjá almennum myndugleikum á Vanganum. Videoviðtalur bøta munandi um tænastuna hjá fólki, sum hava ringt við at flyta seg, og fólki sum búgva á fjarskotnum økjum. Harafturat kann videoviðtalan lætta nógv um hjá almennum starvsfólki.

Vavið á hesum útboðnum fevnir í fyrstu atløgu um kommunulæknaskipanina hjá øllum kommunulæknum í Føroyum, men loysnin skal verða løgd til rættis við atliti til framtíðina, soleiðis at aðrir fakbólkar og almennir myndugleikar kunnu taka loysnina í nýtslu seinni.

# Um veitingina og krøv

Uppgávan hjá veitaranum er at veita videokervið til videoviðtaluskipanina á Vanganum, sum Talgildu Føroyar hava ment. Videokervið er týðandi fyri at tryggja, at videoviðtalurnar rigga á nøktandi hátt.

Les meira um krøv til videokervið, kt-trygd og SLA (Service Level Agreement) í hesum fylgiskjølum:

- fylgiskjal 2a um krøv til videokervið
- fylgiskjal 3 um kt-trygdarkrøv
- fylgiskjal 4 um SLA

Øll krøv skulu vera lokin, áðrenn loysnin verður tikin í nýtslu, tó skulu kt- trygdarkrøvini vera lokin í seinasta lagi eitt ár eftir at sáttmálin er undirskrivaður, um ikki annað er avtalað við Gjaldstovuna.

## Sáttmáli og karmar

Ein sáttmáli verður gjørdur við vinnaran av útboðnum. Sáttmálin fær virkna skjótast gjørligt eftir, at vinnarin er kunngjørdur. Veitarin verður løntur sambært tilboðnum.

Sáttmálauppskot er hjálagt sum fylgiskjal 1.

## Undanførleikakrøv - tilvísingar

Tilboðsgevarin skal bjóða eina rakstrarliga trygga og haldgóða loysn. Tilboðsgevarin skal við tilvísingum vísa á, at loysnin er í rakstri, og at loysnin er útbreidd og verður brúkt av kundum, so sum fyritøkum, almennum stovnum og myndugleikum.

Um Gjaldstovan metir, at loysnin hjá tilboðsgevaranum ikki er nøktandi útbreidd, kann Gjaldstovan sálda tilboðið frá.

Víst skal verða til tilvísingar í fylgiskjali 6.

## Tillutan

Sáttmálin verður tillutaður tilboðsgevaranum, sum bjóðar skynsamasta tilboðið grundað á prís og góðsku.

Gjaldstovan tilskilar sær rætt í hesum útboðnum at samráðast við ein ella fleiri tilboðsgevarar, ið hava tey bestu ella mest fíggjarliga lønandi tilboðini, grundað á tær vektaðu treytirnar í útboðnum.

## Tilboðið skal innihalda

Tilboðsgevarin skal útfylla og innsenda hesi skjøl:

Prísur og góðska á videokervinum skulu skrivast í fylgiskjal 2b, sum er lagt við útboðnum.
KT-trygdarkrøv skulu skrivast í fylgiskjal 3, sum er lagt við útboðnum.
Tilvísing ísv. útbreiðslu og rakstur skal skrivast í fylgiskjal 6, sum er lagt við útboðnum.

## Hvussu verður vekta

Innkomnu tilboðini verða vektað soleiðis:

| | |
|---|---|
| Góðska | 50% |
| Prísur | 50% |

### Góðska

Tilboðsgevari skal í fylgiskjali 2b greitt svara teimum krøvum, sum verða vektað í fylgiskjali 2a.

Ein samlað meting verður grundað á:

| | |
|---|---|
| Implementation plan | 20% |
| Video support end functionality | 30% |
| Core functionality | 30% |
| Scalability | 20% |

Stigatalið verður grundað á ein stiga frá 1-50, har 50 er hægsta stigatal.

Um tilboðsgevarin fær 20 stig ella færri, hevur Gjaldstovan rætt til at vraka tilboðið við teirri grundgeving, at góðskan ikki verður mett at vera nøktandi.

### Prísur

Tilboðsgevari skal í fylgiskjali 2b áseta prísirnar uttan mvg. Tilboðsgevari skal áseta hesar prísir fyri veitingina:

a. Kostnaður fyri at seta videokervið í verk
b. Mánaðarligur kostnaður fyri nýtslu og rakstur av videokervinum

Samlaði prísurin fyri a (verkseting) og b (mánaðarligur kostnaður) yvir eitt trý ára tíðarskeið verður vektað.

Tilboðið við lægsta prísi fær 50 stig. Hini tilboðini fáa ásett eitt stigatal eftir hesum frymli: Tilboðið við lægsta prísi / prís í tilboði, ið skal metast x 50 (t.e. lægsti innkomni prísur býttur við tykkara prís, falda 50).

## Dømi um útrokning

Góðska
Tilboð 1: Hesin tilboðsgevarin skorar lægst, tí loysnin er ikki mett at verða nøktandi. Hesin fær 20 stig.
Tilboð 2: Hesin tilboðsgevarin skorar miðal, tí loysnin er á miðalgóðum stigi. Hesin fær 35 stig.
Tilboð 3: Hesin tilboðsgevarin skorar hægst, tí loysnin er best. Hesin fær 50 stig.

Prísur
Tilboð 1: Tilboðið við lægsta prísi er 60.000 kr. Hetta gevur 50 stig.
Tilboð 2: Næst lægsta tilboðið er 75.000 kr. Hetta gevur 60.000/75.000 x 50 = 40 stig
Tilboð 3: Trið lægsta tilboðið er 90.000 kr. Hetta gevur 60.000/90.000 x 50 = 33,3 stig

Samlað meting
Tilboð 1: Førleikar 20 stig + prís 50 stig = samlað meting á 70 stig.
Tilboð 2: Førleikar 35 stig + prís 40 stig = samlað meting á 75 stig.
Tilboð 3: Førleikar 50 stig + prís 33,3 stig = samlað meting á 83,3 stig. Hesin tilboðsgevarin vinnur sostatt útboðið.

Sáttmálin verður tillutaður sambært ásettu tillutanartreyt, sum er fíggjarliga mest skynsama tilboðið í mun til prís og góðsku/førleikar.

## Viðgerð av innkomnum tilboðum

Útbjóðari letur upp innkomin tilboð aftaná ásettu tilboðsfreist. Útbjóðari kannar, um innkomnu tilboðini lúka form og minstu krøv. Útbjóðari kann, aftaná tilboðsfreistina, venda sær til tilboðsgevarar fyri at útgreina innihaldið í tilboðunum. At enda verða innkomin tilboð mett í samsvari við ásettu tillutanartreytir.

Tá ið útbjóðari hevur tikið avgerð um tillutan av sáttmálanum, verða allir tilboðsgevarar kunnaðir samstundis. Kunningin inniheldur eina frágreiðing um avgerðina.

Útbjóðari tilskilar sær rættin ikki at taka av nøkrum tilboði, um mett verður, at góðskan er ov vánalig, ella um prísirnir ov høgir.

## Tilboð galdandi

Tilboðini skulu verða galdandi í 6 mánaðir.

# Hentar upplýsingar

Tilboðsgevari hevur møguleikan at fáa fleiri upplýsingar við at seta skrivligar spurningar. Spurningar skulu sendast til **keypsportal@gjaldstovan.fo**

Spurningar, ið eru settir fyri mánadagin 14. juli 2026, kl. 12.00, verða svaraðir í seinasta lagi 16. juli. 2026, kl. 12.00.

Spurningar verða svaraðir skrivliga. Allir spurningar og øll svar kunnu síggjast dulnevnd á keypsportal.fo

GJALDSTOVAN

Tilboðsfreist og teldupostadressa til avhendan av tilboði.

Freist **10. august 2026 kl. 12.00**

Tilboð skulu sendast til **keypsportal@gjaldstovan.fo**